

*Jupiter liggur á Skála, har ymiskar umvælingar verða gjørdar umborð á skipinum. – Tá ið vit loysa aftur um ólavsøkutíð, fara vit eftir tí, sum tá er at fáa. Tað verður so antin sild ella svartkjaftur, sigur reiðarin, Atli Hansen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gylta gullið "spøkir" aftur norðanfyri…

**Norðhavssildin var eitt kærkomið ríkidømi í sínari tíð, og nú sildin aftur er farin at ferðast gjøgnum føroyskan sjógv, kann hon enn einaferð gerast okkum ein rættiligur fongur, sigur Atli Hansen**

NORÐHAVSSILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Atli Hansen, formaður í felagnum Nótaskipum, fegnast um, at føroysk skip aftur fáa norðhavssild í føroyskum sjógvi norðanfyri.

- Jú, tað er vist, at vit eru spentir upp á, hvussu gongdin við norðhavssildini verður. Tað er bara so torført at meta um, hvussu hetta fer at tørna út, tí hetta er so nýtt í okkara verð - í nýggjari tíð.



*- Jú, tað er vist, at vit eru spentir upp á, hvussu gongdin við norðhavssildini verður. Tað er bara so torført at meta um, hvussu hetta fer at tørna út, tí hetta er so nýtt í okkara verð - í nýggjari tíð, sigur Atli Hansen, formaður í felagnum Nótaskipum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Heystið best

Atli vísir á, at tá ið føroyingar fyri einum 40-50 árum síðan í ríkiligt mát vórðu vælsignaðir við hesi ediligu sildini, hildu menn, at besta tíðin var frá byrjanini av juli til seinnapartin í oktober.

- Tað er ógjørligt at siga, hvussu gongdin við sildini fer at vera, men tað hevði verið ógvuliga áhugavert, um vit fóru at síggja gamla ferðamynstrið aftur.

Hann vísir á, at norðhavssildin var eitt kærkomið ríkidømi í sínari tíð, og nú sildin aftur er farin at ferðast gjøgnum føroyskan sjógv, kann hon enn einaferð gerast okkum ein rættiligur fongur.

- Men vit kunnu ikki selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin, sigur Atli.

### Partrola

Atli Hansen hevur verið burturstaddur nakrar dagar og sigur seg tí ikki vera so væl "uppdateraðan", nú skipini aftur hava fingið norðhavssild.

- Eg havi skilt, at Christian í Grótinum og Norðborg hava partrolað, og eg havi skilt, at Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu eisini eru farnir at gera eina roynd.

*Men hví partrola hesi stóru skip eftir sildini? Er tað tí, at hon stendur so spjødd – ella er tað tí, at skipini vilja spara olju, nú oljan er so dýr?*

- Eg haldi, at talan er um bæði. Oljan er dýr, og við partroli eru betri møguleikar at fáa fatur á sildini, sum eg havi skilt stendur spjødd, sigur Atli Hansen.

Jupiter liggur

Formaðurin í Nótaskipum er eisini reiðari á Jupiter.

Í løtuni liggur skipið á Skála, har ymiskar umvælingar og ábøtur verða gjørdar umborð.

- Tá ið vit loysa aftur, helst um ólavsøkumundið, fara vit eftir tí, sum tá er at fáa. Tað verður so antin sild ella svartkjaftur, sigur Atli Hansen.

# Atlantic Petroleum fellir í virði

**Ìleggjarar hava lyndi til at selja síni partabrøv í Atlantic Petroleum, og hetta ávirkar kursin**

Atlantic Petroleum er lækkað munandi seinastu vikurnar. Fyrsta handilsdagin 15. juni lá

Atlantic Petroleum á 380. Eftir hetta hava íleggjarar staðfest vinning, t.e. selja partarbrøvini, soleiðis at kursurin 14. og 15 juli hevur ligið um 290.

- Tá felagið varð virðismett í desembur var langtíðar. Oljuprísurin á 30 dollarum nýttur. Marknaðarsemja er nú um, at oljufeløg eiga at príssetast við einum oljuprísi á 35-40 dollarar. Hetta merkir, at kursurin á Atlantic

Petroleum eigur at liggja omanfyri 400, skrivar Kaupthing.



# Bústaðarpakki klárur at pakka upp

**Almanna- og heilsumálaráðið kunngerð mánadagin eina bústaðarpolitiska ætlan**

Mánadagin verður ein nýggjur bústaðarpolitikkur almannakunngjørdur. Talan er um tann sokallaða bústaðarpakkan, ið dyrgt hevur verið eftir í eitt ár. Samgongan er vorðin samd um innihaldið í pakkanum, men vit onnur mugu til mánadagin at frætta um innihaldið.

Samgongan heldur ikki lítið um seg sjálvan og sín politikk.

- Hetta kann gerast størsta bústaðarpolitiska frambrotið í Føroyum tey seinastu 30 árini, heldur altso Almanna- og heilsumálaráðið sjálvt.

**-HR**

# Regnaði á Miðvág

Vestanstevna gav fitt yvirskot til ítróttafeløgini í Miðvági

Veðrið var tó einki serligt um vikuskiftið. Og tað ávirkaði sjálvandi vestanstevnuna. Men kortini ikki meira enn so, at tað gav fitt yvirskot til ítróttafeløgini í bygdini.

Sóley Hansen, fyriskipari, sigur, at eini túsund fólk vóru til kappróðurin. Hóast tey høvdu roknað við fleiri fólkum, so eru tey væl nøgd.

At kalla øll tiltøk gingu eftir vild, hóast veðrið var ringt. Eisini dansurin savnaði nógv fólk, men tey vóru kanska nakað sein frá húsum.

Ikki minst kabarettin hevur í fleiri dagar verið spæld fyri fullum húsum í bygdaskúlanum í Miðvági.

Tað eru ítróttafeløgini í Miðvági, sum fáa ágóðan av inntøkunum frá vestanstevnuni.

**-HR**